STARV sosialurin

# Sosialinum tørvar blaðfólk

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi, og har tú allatíðina ført nýggjar og spennandi uppgávur, so er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Okkum tørvar blaðfólk, og vit bjóða eitt hendingarítk og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Seinastu tíðina hava vit økt um virksemi við at skriva tíðindi til www.portal.fo. Hetta hevur eisini ført til økt krøv til redaktiónina, men er eisini við til at menna tíðindaflutningin, sum støðugt verður dagførdur á internetinum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna, umframt støðugu tíðindi á internetinum.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 8. januar 2002. Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. (GG: Hetta er sama starv, sum varð lýst leyst síðstu viku í november. Eftir áheitan er freistin longd)

sosialurin sosialurin






TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Pedagogur/hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi, 40 tímar um vikuna, ella eftir avtalu, til "Margarinfabrikkina - Virkishús fyri børn og ung".

**Margarinfabrikkin**
Margarinfabrikkin er eitt frítíðar- og virkishús fyri størri børn (8-12 ár) og ung (13-19 ár).

Opið er gerandisdagar frá kl. 13.00-17.30 fyri børn, og frá kl. 18.00-22.00 fyri ung.

Kvøldvaktirnar verða býttar soleiðis, at tað verða 1-2 kvøldvaktir um vikuna.

Margarinfabrikkin er framvegis í støðugari menning har roynt verður at fylgja við menningini og tí nýggja rákinum, ið rørist ímillum børn og ung. Samstundis verður roynt at geva teimum ábyrgd og samávirkan til virksemið í húsinum.

**Vit vænta**
at umsøkjarin:
- er áhugaður í at arbeiða við størri børnum og ungum,
- er opin, vísir ábyrgd og er positivur,
- hevur áhuga í skapanarevnum/er skapandi,
- er fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt,
- vísir virðing fyri sínum medmenniskjum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við Føroya pedagogfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hendrik Andersen, tlf. 312217, ímillum kl. 13.00-18.00, ella Katrin Petersen, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. januar 2002. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur til Margarinfabrikkina".

SNARSKIVAN


Lesið Sosialurin -tað loysir seg


# Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara til Felagsskúlan á Oyrarbakka

Starvið er tíðaravmarkað frá 7/1 til 11/10-2002.

**Lærugreinir:**
- Danskt
- Enskt
- Tilevning
- Heimkunnleiki

í framhaldsdeildini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran, tlf. 422084 ella 423098.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir og ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 3. januar 2002.

**Skúlastýrið fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka**
v/Mariu í Skorini
FO-470 Eiði

# HÚSAVØRÐUR!

Søkt verður eftir húsavørði til Kirkjubøar kommunu 15 tímar um vikuna, til skúlan og barnagarðin.
Arbeiðið er í dagtímunum. Møguleiki er eisini fyri, at fáa aðrar uppgávur, eftir nærri avtalu við kommununa.

Viðkomandi skal hava handverkaraútbúgving ella líknandi, og verður lønt eftir sáttmálanum millum Havnar Handverkarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag.

Umsóknir við prógvum v.m. skulu sendast til Kirkjubøar kommunu FO -176 Velbastaður att: Annfinn Brekkstein og merkjast "Húsavørður"

Seinasta freist at lata umsóknir inn er
**10. januar 2002**

KIRKJUBØAR KOMMUNA


ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA




# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**DAIHATSU CHARADE CS**
Árg. 85, sýnaður í mars 2001, góð summar- og píkadekk, til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 253230*

**NISSAN CABSTAR**
við last og krana, bíliga til sølu.
*Tlf. 452066*

**PÍKADEKK**
Fýra góð píkadekk, 165x13, til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 310151*

**HONDA ACCORD**
Honda Accord 2.0 til sølu sum eykalutir.
*Tlf. 226376*

**TIL SØLU**
Opel Corsa 1.4, árg. 10/95, væl hildin, ikki roykjara bilur bíliga til sølu.
*tlf. 457727 ella 217728*

**DATSUN MICRA**
v/ 4. hurðum, reyður, selist bíliga, krevur ábøtur, kann síggjast uttanfyri Tórugøtu 14. Áhugað ringi
*213535 ella 316769*

**NISSAN BLUEBIRD 2.0 SLX**
Árg. 89 koyrir væl. Til sølu fyri hægsta boð.
*Tlf. 254299 ella 455553*

**BILUR TIL SØLU**
Honda CR-V 4 x 4 til sølu. Er frá 6/98 og hevur koyrt 38.000 km.
*Ring 216456*

**VW JETTA 1.6**
árg. 1987, í góðum standi, hevur centrallás og alarm.
*Tlf. 320001*

**TIL SØLU**
Toyota HiAce vøruvognur, árg. 88, nýsýnaður.
*Tlf. 448618 ella 218618*

**BMW 525i**
til sølu, árg. 90, 17" felgur, fartkontrol, sóltak, í sera góðum standi, Ring og fá meiri at vita.
*Tlf. 216180*

**LEIGA BIL**
fyri ein sámuligan prís.
*Tlf. 317865 - 224910*

**MITSUBISHI PAJERO 2.5**
longra modellið, árg. 89, er umskrásettur til persónbil og hevur setur aftan.
*Tlf. 333078 ella 255672*

**FORD ESCORT 1.8**
Diesel, st.car, árg. 91, hvítur, tvey sett av felgum, sleipikrók, takboylar – til sølu.
*Tlf. 319921 ella 210921*

**ALU-FELGUR**
av slagnum WSL 15" við góðum dekkum 195-50-15 av slagnum Dunlop til sølu fyri 2.500 kr. Passa millum annað til Toyota, Opel og Nissan.
*Tlf. 220744*

**TIL SØLU**
3 stk. Dunlop snow grip píkadekk á felgum til Toyota Hiace til sølu fyri 300 kr. stk. Eru sum nýggj.
*Tlf. 220744*

**REMUS TUNINGÚTSTOYT**
við dupultum útgangum, ið passar til ein Opel Ascona til sølu fyri 1.000 kr.
*Tlf. 220744*

## Amboð

**RUNDSAG TIL SØLU**
Luna bygningssag 380 v, við forleingjaraborði. Blað: 350 mm, í sera góðum standi.
*Tlf. 371937 ella 211937*

## Arbeiði

**ARBEIÐI YNSKIST**
29 ára gamal maður søkir arbeiði í Havn. Alt hevur áhuga! Royndir innan teldu og bókhald.
*Tlf. 252711*

**ARBEIÐI SØKIST**
Ungur amerikanari søkir læruplass ella arbeiði innan fyri timburarbeiði o.a. fyrifallandi arbeiði. Hevur koyrikort.
*Jason, tlf. 322070*

**ARBEIÐI SØKIST**
Reingeringsarbeiði ynskist eftir vanliga arbeiðstíð.
*Tlf. 318334*

## Barnaansing

**FITT OG ÁLÍTANDI**
kona/genta søkist at ansa tveimum børnum – 1 og 3 ár – aftaná nýggjár.
*Tlf. 310431*

**KONA ELLA GENTA**
søkist at ansa eftir 8 mðr. gomlu Urd 3/4 tíð – mánadag-fríggjadag – frá 15. jan. 2002.
*Vinarliga ring 320308, Durita*

**BARNAANSING Í VÁGI**
Søkt verður eftir fólki - ungt sum eldri - til at ansa synum okkara, sum eru ávíkavist 4 1/2 ár og 8 mánaðir, í vanligari arbeiðstíð.
*Ring 374059!*

**GENTA/KONA SØKIST**
at ansa eftir Sedeu, 1 1/2 ára gomul, mánadag til fríggjadag kl. 8.30–16.30, frá januar til aug. 2002. Vinarliga ring
*Tlf. 218071, Irena*

## Barnaútgerð

**YNSKIST**
Brúkt pusliborð ynskist til keyps.
*Tlf. 322200/243377*

**BARNAVOGNUR**
Lítið brúktur, svartur barnavognur við lyft, puslitasku og regnslagi til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 311991*

**BRIO KOYRISTÓLUR**
við kalesju, avfjaðraður, við stórum hjólum, grønur á liti,til sølu.
*tlf. 313356/213356*

**BARNAÚTGERÐ TIL SØLU**
Babyklæðir (std. 56-74 cm.) og ein baby koyristólur (skrástólur) bíliga til sølu. Eisini er ein Brio dukkuvognur til sølu fyri 600 kr. Nýprísur 1.000 kr.
*Tlf. 310383 - 250051*

**BARNAVOGNUR**
Myrkabláur barnavognur, brúktur til eitt barn, til sølu fyri 1400 kr.
*Tlf. 447807 ella 256507*

## Bátaútgerð

**VERKSTAÐSHONDBÓK**
Bukh Diesel, DV 10+20 til sølu.
*Tlf. 328081*

**YNSKIST**
Tvær elektroniskar oljutrýstsnellur ynskjast til keyps.
*Tlf. 447638*

## Bingo

**NÝÁRSBINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 3. jan. kl. 19.30.
*Eldrafelagið Borgin*

**BINGO**
verður í Pállstovu leygardagin 29. des. kl. 15.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli 6 x 500 kr. Minibingo, eykaspæl, koyring heim.
*Kiwanisklubbin Rósan*

**KAGGIN**
Gott nýggjársbingo verður leygarkvøldið 29. des. kl. 19.00. Nógv gott at vinna. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
*Kaggin*

## Bøkur

**TIL SØLU**
Ymiskir rithøvundar týddir til danskt: Samleren bogklub, 16 bind. Gyldendal forlag, 41 bind. Steen Hasselbachs forlag, 16 bind. Alt verður selt bíliga.
*Tlf. 321915 / 220660*

**TIL SØLU**
»Grønlands historie«, innbundin, 500 bls., 40 kr. »Clio«, 1923-24, 600 bls., 40 kr.
*Tlf. 220660 / 321915*

**TIL SØLU**
»Trap Danmark«, I bind, 1000 bls., 30 kr. »Terje Vigen«, 20. opplag, 20 kr.
*Tlf. 220660 / 321915*

**TIL SØLU**
»Den store strid«, 700 bls., 40 kr. »Høstskib« av Bjørn Th. Bjørnson, 290 bls., 30 kr.
*Tlf. 220660 / 321915*

**TIL SØLU**
»Historiske malerier« af P.P., 7 bind í gotiskum stavum, frá 1880-unum, 140 kr. Paul Mahalin »Musketerernes ætling«, 1977, 80 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
Theodor Kittelsen »Tekst, tegninger og malerier«, 400 bls., 100 kr. Anus Mundi »5 år i Auschwitz, 30 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
»Mindy«, dansk bogforlag, 1983, 20 kr. »Kammerat Jesus«, 1979, 20 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
»Den tavse verden« í teksti og myndum, 30 kr. »Nordiske gude og heltesagn«, 1984, 80 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
»Nordisk konversationsleksikon«, 5 bind + leksikon årbogen, sum nýtt, 1.500 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
2 bind »Claudius Messias« 1978, íalt 30 kr. »I havets midte«, Samuel Agnon, 1968.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
»Fredløse menn« 1967, 20 kr. »Krøblingen fra Nürnberg« 1959, 20 kr. »SOS Atlantic Whipper«, 15 kr. »Tale i røret« 1981, 15 kr. »Kaptajn fra Bombay«, 20 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
»Scott Amundsen« 1979, 60 kr. »Stjernehimlen og dens vidundre«, stór bók, 100 kr.
*Tlf. 220660 - 321915*

**TIL SØLU**
»Købmandens haandbog« 1916, 680 bls., 80 kr. Forlaget Fremad: 50 innbundnar bøkur, stuttsøgur, frá 1955-, 150 kr. íalt.
*Tlf. 220660 - 321915*

## Burturm. /funnið

**FARTELEFON BURTURMIST**
í Havn í vikuskiftinum. Hevur tú funnið hana, so vinarliga ring
*tlf. 310293*

**JÓLADANSURIN**
Badmintonhøllini. Tá vit ruddaðu høllina funnu vit ein ring og einar brillur.
*Ring 215353*

**FUNNIÐ**
uttan fyri "Dadduna" týsdagin 18. des.: Hvít barnablusa og svartar barnacowboybuksur.
*Ring 321197*

## Býli

**TIL LEIGU**
Hús Undir Varða til leigu til fólk, ið ikki roykja. Fýra sovikømur, 120 fermetrar. Gevið eitt boð. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
*Bill. mrk. 147*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Ungt par við einum barni ynskir íbúð til leigu.
*Tlf. 318086*

**HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST Á EIÐI**
Par við einum barni ynskir hús ella íbúð á Eiði. Roykja ikki.
*Tlf. 310685 - 224613*

**ÍBÚÐ SØKIST**
Hevur nakar eina íbúð til leigu við Gøtugjógv ella í Norðragøtu, kann viðkomandi ringja á
*tlf. 0045 22504473*

**KAMAR**
v/ atgongd til køk og bað til leigu frá 1. febr.
*Tlf. 312018*

**ÍBÚÐ/KAMAR Í HAVN**
25 ára gomul genta, ið skal byrja á skúla í jan. 02, sóknast eftir íbúð/kamari í Havn. Royki ikki.
*tlf 452075 & 221530*

**HÚS TIL LEIGU**
Nýggj hús miðskeiðis í Tórshavn - 2 min. frá Vaglinum - til leigu. Húsini standa sera væl fyri við góðum útsýni í friðarligum umhvørvi. Húsini verða útleigað undir einum (ca. 250 fermetrar) ella verður niðasta hædd útleigað sum íbúð fyri seg (ca. 80 fermetrar).Húsini eru sera væl egnað sum skrivstova, ella kombinerað skrivstova og bústaður. Góð parkeringsviðurskifti. Møguleiki er fyri at mið- og ovastahædd verða útleigað fult/partvíst møblerað. Ognin verður einans útleigað til fólk, ið eru røkin.
*Tlf. 210022*

**KAMAR YNSKIST Í HAVN**
20 ára gamal drongur ynskir kamar til leigu í Havn frá 7. jan. 2002. Royki og drekki ikki.
*Ring 455462*

**VERILSI TIL LEIGU**
Gott stórt verilsi til leigu við atgongd til stóran køk, bað og vaskimaskinu, frá 9.1.2002.
*Tlf. 313799*

**KAMAR YNSKIST Í HAVN**
20 ára gamal drongur ynskir kamar til leigu í Havn frá 7. jan. 2002. Roykir og drekkur ikki.
*Ring 455462*

**HÚS TIL LEIGU**
uppi í Húsi í Miðvági frá 15. januar.
*Tlf. 314845 ella 214845*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Andeilsíbúð ynskist til keyps ella lítil íbúð til leigu ímillum Keypmannahavn og Skovlunde.
*Tlf. 211434*

**ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN**
Íbúð í Keypmannahavn til leigu í tíðini 19/12-01 til 24/01-02. Gott buss- og toksamband - 10 min. inn á ráðhúsplássið. Meira fæst at vita á
*Tlf. 210022*

**TIL LEIGU**
Nýggj íbúð í Tórshavn við einum hjúnarúmi til leigu frá hálvum januar. 2 stór kømur til leigu frá 1. januar.
*Bill. mrk. 12-44*

**HÚS TIL LEIGU**
Stór sethús miðskeiðis í Havnini til leigu frá 1. mars 2002. Uml. 300 kvm. innrættað – stór og góð rúm. Sera vælegnað til skrivstovur – rímilig parkering. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1236-1*

## Dansur

**DANSUR Í KVÍVÍK**
Góður dansur verður 2. jólakvøld. Arne Emil spælir.
*Glæman*

## Dýr

**HAMSTRARAR**
Vit vilja fegin keypa ein/tveir hamstrarar.
*Tlf. 260880/441983*

**KETTLINGAR**
Vit eru tveir sera fittir kettlingar (frensar) ið verða latnir djóravini.
*Tlf. 226863*

**HUNDAHVØLPUR YNSKIST**
Hundahvølpur av lítlum slag ynskist til familju, ið er góð við dýr.
*Tlf. 321306 ella 223958*

**KISKUS ER BURTUR**
Grástríputur frensur við hvítari bringu og hvítum labbum er burturblivin í Schrøtersgøtu tann 16. des., er sera spakur. Vinarliga sigið okkum frá, um tit hava sæð hann.
*Tlf. 314424 ella 224643*

## Innbúgv

**TIL SØLU**
Brúkt dupult boxmadrassa/song, stødd 140 x 200, til sølu fyri kr. 400. Klár at avheinta.
*Tlf. 316774/317654*

**SOFABORÐ**
83 x 148 palisander, sum nýtt, til sølu vegna plásstrot fyri 1500 kr.
*Tlf. 314405*

**SKRIVSTOVUMØBLAR**
Vit hava nøkur brúkt skrivaraborð og reolir til sølu.
*Tlf. 310901 (8.30 til 16.00)*

**REOL TIL SØLU**
Myrkt, vælhildið hillalag bíliga til sølu.
*Tlf. 333843*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:……………………………………………..
Bústaður:………………………………………….
Bygd/býur:……………………………………….
Tlf.: ………....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki